# LEIÐSLUFRÁGREIÐING

## Virksemi

Vinnuframi varð settur á stovn sambært løgtingslóg nr. 81 frá 8. mai 2001 um vinnuframa grunn. Enda málið við Vinnuframa er, at hann skal stuðla vinnuni í avmarkaðan mun – uttan at veita rakstrar- og íløgustuðul. Grunnurin stuðlar tiltøkum, sum fjøltátta vinnulívið og økja um nýtsluna av vitan.
Kunngerð um virksemi og umsiting hjá Vinnuframa varð lýst 29. november 2001, har landsstýrismaðurin í vinnumálum – samsvarandi vinnupolitikki Landsstýrisins – staðfestir tey vinnu greina øki, sum serligur dentur skal leggjast á at stuðla.
Umframt omanfyri nevnda virksemi umsitur Vinnuframi eisini stuðulsskipan til skipasmíð og ymsar uppgávur fyri Vinnumálaráðið.

## Árið 2012

Stýrið fyri Vinnuframa hevur lagt dent á at stuðla sølufremjan í útlondum, vinnulívsmennig, ferðavinnutænastur og kreativar vinnur í 2012.

Eins og undanfarna ár verður raksturin støðugt rationaliseraður, soleiðis at skilja, at umsitingin átekur sær meira ráðgevingaruppgávur, ið áður vórðu røktar av uttanhýsis ráðgevum. Við hesum leisti, metir stýrið, at stuðulin verður betri gagnnýttur til mennandi verkætlanir samfelagnum at frama. Nýggja skipanin har ið samskipari grunnsins er eitt bindilið ímillum stýrið og umsøkjaran virkar til, at umsøkjarin fær skjótari viðgerð og eisini røttu ráðgeving fyri møguleikarnar við tí góða hugskotinum.

Vinnuframi hevur umsitið skipasmiðjustuðul eins og undanfarin ár og hevur verið umboð í norðurlendskum samstarvið innan kreativar vinnur undir KreaNord og eru 2 bóklingar givnir út í 2012 hesum viðvíkjandi. Eins og í 2011 hevur Vinnuframi umsitið invest.fo og svarað fyrispurningum frá ymsum heimspørtum um fíggjarlig og skattlig viðurskifti í Føroyum.

Innrættingin av Granskarasetrinum hevur fylt nógv í virkseminum hjá Vinnuframa. Arbeiðið uppá seinastu byggistigini byrjaði við árslok og varð liðugt liðugt í apríl. Afturat vanliga virkseminum hevur Vinnuframi sett aðrar verkætlanir í gongd. Samstarv er komið í lag við Dansk Eksportråd, eftir eitt væleydnað tiltak í Føroyum í heyst. Arbeiðið at gera ein faldara og portal við yvirliti viðvíkjandi aktivum íleggjarum og stuðulsmøguleikum varð byrjað í 2012, eins og skjøtil varð settur á at gera eitt business angel netverk við aktivum íleggjarum.

Rentuinntøkurnar vóru 809 tkr. í 2012 mun til 1.302 tkr í 2011

## LEIÐSLUFRÁGREIÐING

Vinnuframi hevur í 2012 viðgjørt 57 umsóknir, harav 29 umsóknir vórðu játtaðar. Í stuðli vórðu veittar 2.486 tkr. brutto, meðan 1.188 tkr. vórðu afturførdar.

Eginognin við árslok var 40.478 tkr., herav er stovnsfæið 29.479 tkr. Broytingin í stovnsfænum kemst av eini niðurlaging á kr. 3,4 mió til innrætting av matgranskingarøkinum í Granskarasetrinum.

Við árslok 2012 er tøki peningurin 37.267 tkr., meðan játtaður ikki útgoldin stuðul er 2.619 tkr.

**Framtíðin**

Stýrið fyri Vinnuframa fer í 2013, at leggja dent á at játta stuðul til marknaðarføring, sølufremjandi tiltøk, kreativar vinnur og ferðavinnutænastur. Vinnuframi arbeiðir støðugt við at gerast meira sjónligur og brúkaravinaligur í 2013.

Afturat høvuðsvirkseminum, sum er at stuðla tí góða hugskotinum, átekur Vinnuframi uppgávur frá Vinnumálaráðnum, m.a. umsiting av Invest.fo og virkar sum myndugleikaumboð í norðurlendskum samstarvi innan kreativar vinnur.

Vinnuframi byrjaði í 2010 arbeiði uppá at seta eitt Granskarasetur á stovn í Føroyum til tess at seta ferð á íverksetan av nýggjum granskingarvirksemi og menning av verandi virksemi í Føroyum.

Stovnsfæið er niðurlagað við kr. 13,4 mió til innrætting av Granskarasetrinum. Slík Granskarasetur hava virkað í mong ár í flestøllum framkomnum londum við samstarvi millum granskingarstovnar, fróðskaparsetur, vinnulív, almennar stovnar og politisku skipanina.

Í 2011 varð felagið iNOVA sett á stovn. Tað er partafelag ið hevur til endamáls at reka Granskarasetrið og byggja upp eitt felags granskingar- og menningarumhvørvi. Endamálið er at fáa fyritøkur og almennar stovnar at leggja granskingar og menningarvirksemi í Granskarasetrið og at keypa tól í felag fyri á tann hátt saman at virka fyri eini felags tóllund í Føroyum.

Vinnuframi fegnast um, at tilgongdin og undirtøkan hevur verið so stór. Vónandi verður hetta eitt stórt framstig fyri granskingar- og menningarumhvørvið í Føroyum.

## LEIÐSLUFRÁGREIÐING

### Stuðul latin og/ella játtaður í 2012

Í 2012 hevur Vinnuframi m.a. játtað/útgoldið stuðul til hesar verkætlanir:

***Umsøkjari***

Solea Sp/f við Elsu Mariu Holm Olsen sum verkætlanarleiðara.

***Lýsing:***

Felagið Solea Sp/f hevur til endamáls at fremja sølu og tænastu innanfyri ferðavinnu. Ein røð av samstarvspartum eru knýttir at hesi verkætlanini hjá felagnum, bæði úr matvøru- og ferðavinnuni, umframt miðlaheiminum. Verkætlanarleiðarin, Elsa Maria Olsen hevur drúgvar royndir eitt nú innan útbúgvingarleiðslu og hevur verið stjóri á Rúsdrekkasølu Landsins.

***Stuðul:***

Vinnuframi játtaði í januar 2012 stuðul til menning av tænastum innan ferðavinnu og sølufremjandi tiltøk í sambandi við verkætlanina.

***Endamál:***

Endamálið við verkætlanini er at varpa ljós á føroyska rávøru í gourmetvinnu og tvinna møguleikarnar á økinum saman við upplivingar- og ferðavinnu í Føroyum. Endamálið er bæði at økja um eftir-spurningin eftir føroyskum rávørum á góðskuhøgum stigi heima og uttanlands, umframt at økja um ferðafólkatalið til Føroya við at samantvinna ferðavinnu og gourmet- og mentanarupplivingar.

Verkætlanin tekur hædd fyri tíðarrákinum á økinum. Serliga hevur verið hugsað um norðurlendska køkin, ið hevur vakt ans í altjóða høpi fyri sínar dygdir. Fyriskipararnir eru av teirri fatan, at Føroyar eisini kunnu gerast partur av hesum. Harumframt varð staðfest, at tíðin er búgvin til eina slíka verkætlan í Føroyum, tá hugsað verður um, hvussu nógv matstovuyrkið í Føroyum hevur ment seg seinastu árini.

***Úrslit:***

Verkætlanin varð skipað sum fleiri partar, ið allir høvdu til endamáls at skapa umrøðu og tilknýti til føroyska gourmetvinnu.

## LEIÐSLUFRÁGREIÐING

Í fyrstu atløgu varð fyriskipað fyri gourmetátaki í Danmark við føroyskum rávørum, síðani einari ferð til Føroyar við donskum kokkum, altjóða journalistum og matkritikarum.

Harumframt var skipað fyri einum átaki í London á Michelin-matstovuni Hedone, har Michelin-kokkurin, Mikael Jønsson gjørdi gourmet-mat út føroyskum rávørum. Umboð fyri altjóða tíðarrit innan gourmetferðavinnu luttóku. Rávøruseljarar og fleiri 2 stjørnaðir Michelin-kokkar luttóku eisini, umframt umboð frá føroysku ferðavinnuni, rávøruvinnuni og aðrir innbodnir gestir.

Nógv jalig umrøða frá átøkunum hevur verið í kendum tíðarritum uttanlands, og hevur verkætlanin rokkið endamálinum, at seta føroyska mat-og ferðavinnu á dagsskránna.

Í apríl 2013 vóru ein røð av kokkum, tíðindafólkum og ummælarum síðani boðin til Føroya. Hetta var framhald av átakinum í London. Ferðin knýtti føroyska matmentan saman við nøkrum serstøkum ferðaupplivingum úti í føroysku náttúruni. Sum skilst á verkætlanarleiðaranum, er ein røð av greinum og ummælum, um føroyska matmentan í fleiri kendum tíðarritum úti í heimi, ávegis.

***Stuðulsskipanir, ið søkt varð ígjøgnum:***

Søkt varð í gjøgnum stuðulsskipanina fyri sølufremjandi tiltøk, hvørs endamál er at stuðla tiltøkum uttanlands, ið kunnu fremja føroyskan útflutning, har studningur verður veittur til serlig marknaðarátøk á nýggjum marknaðum ella at marknaðarføra nýggjar vørur.

Harumframt varð søkt í gjøgnum stuðulsskipanina "Menning av ferðavinnutænastum". Endamálið við hesi skipan er at stuðla menningini av tænastum til ferðafólk, tá tænastuveitarar taka stig til felags menning av ferðavinnutilboðum

## LEIÐSLUFRÁGREIÐING

### *Umsøkjari*

Sp/f Taste The Faroe Islands við Jan E. Petersen

### *Lýsing*

Taste the Faroe Islands varð sett á stovn í 2010 og umboðar Tavuna og Primafisk á amerikanska marknaðinum. Høvuðsendamálið við felagnum er at virka sum sølufremjandi liður millum føroyskan fiskaúrdrátt og amerikanska marknaðin. Høvuðsvøran eru fiskapylsur, sum í høvuðsheitum eru tilvirkaðar burturúr gulllaksi. Jan E. Petersen hevur virkað sum verkætlanarleiðari, og hann hevur nógvar royndir úr vinnulívinum og hevur í fleiri ár ment fiskavørur til føroyska heimamarknaðin.

### *Stuðul*

Vinnuframi játtaði í november 2012 stuðul til eitt sølufremjandi átak í USA.

### *Endamál*

Endamálið við verkætlanini er at marknaðarføra føroyskar fiskavørur á amerikanska marknaðinum - í fyrstu atløgu í New York. Til tess at røkka hesum verður endamálið at fáa avtalu við umboð, ið kennir amerikanska marknaðin væl. Og saman við umboðnum er endamálið at fara undir eitt marknaðar og søluátak, ið kann gera føroysku fiskavørurnar sjónligar á amerikanska marknaðinum. Serstakliga er endamálið at gera vøruna kenda fyri innkeyparum hjá stóru handilsketunum. Ítøkiliga er ætlanin eitt nú at menna ein søluvogn, ið verður umbygdur og sniðgevin, til at umboða "Taste the Faroe Islands".

### *Úrslit*

Avtala er gjørd við marknaðarføringsfelagið Source One, ið hevur stóran kunnleika til júst henda marknaðin. Og eitt marknaðarátak er farið ígongd, har aðaltátturin eru fiskavørur úr einum óspiltum náttúru umhvørvi. Ein rúgva av sølu og marknaðarføringstilfari er framleitt, og sølubilurin, ið skal umboða Taste the Faroe Islands á sølufundum og til serlig átøk, er næstan liðugur. Valdi søluleisturin er eitt beinleiðis fokus á stóru keturnar, eitt nú Whole Foods og Fairway, og fundir verða samskipaðir við fleiri av hesum ketum komandi tíðina. Harumframt eru fleiri stórar og týðandi sølumessur á skránni komandi árið.

Eyðkenda Primafisk fiskapylsan er kjarnan í hesum sølufremjandi átakinum. Pylsan verður mett at hava stórur møguleikar, einamest, tí at hon er heilt serstøk í mun til aðrar vørur á marknaðinum.

## LEIÐSLUFRÁGREIÐING

### *Stuðulsskipanir, ið søkt varð ígjøgnum*

Taste the Faroe Islands søkti um stuðul í gjøgnum stuðulsskipanina fyri sølufremjandi tiltøk. Endamálið við hesi skipan er at at stuðla tiltøkum uttanlands, ið kunnu fremja føroyskan útflutning. Her kann endamálið bæði vera at koma inn á nýggjar marknaðir, ella at marknaðarføra nýggjar vørur.

### *Umsøkjari*

JT electric Ltd. við Rúna Petersen sum verkætlanarleiðara.

### *Lýsing*

JT electric Ltd. er el-innleggjarafyritøka, ið hevur aliøkið sum sergrein. Verkatlannarleiðarin, Rúni Petersen, hevur útbúgving innan sølu og fleiri enn tíggju ár av royndum á søluøkinum. Eitt nú hevur hann starvast hjá handilsvirkinum Haraldsen, umframt hjá Blika og Knassum.

### *Stuðul*

Vinnuframi játtaði í november 2012 at stuðla verkætlanini "TrawlCamera LIVE".

### *Endamál*

Endamalið við verkætlanini er at menna eina prototypu til eitt sonevnt live trolkamera. Henda tøknin fer at gera tað møguligt at hyggja, beinleiðis av brúnni, eftir botninum og fiskasløgum við tí endamáli at trola úrslitabetur og neyvari. Live myndin gevur eitt gott grundarlag fyri at meta um, hvørt botnurin er egnaður til fiskiskap, og um hvørji fiskasløg eru til staðar. Soleiðis kunnu skip sleppa undan at trol og botnur valda hvørjum øðrum skaða, umframt at sleppast kann undan at fiska um ætlaði fiskurin ikki er til staðar.

Verkætlanin er ein víðari menning av væl umtókta TrawlCamera, ið felagið hevur ment í gjøgnum sínar serkunnleikar á økinum. Fleiri av kundunum hava eftirspurt møguleikan at síggja beinleiðis mynd frá upptøkutólinum, men beinleiðis akustiskt video samskifti er sera krevjandi, og tí hevur verið alneyðugt at gera kanningar av samskiftistøkni á økinum umframt møguligum samstarvspartnarum á økinum. Akustiskar eindir, til samskifti við langari fjarstøðu, eru á marknaðinum, eitt nú til kavbátar, men eindirnar senda bert við einum brotparti av tí, sum videosamskifti krevur.

Men núverandi tøknin gevur møguleika fyri víðarimenning á økinum, men til hetta krevst tøkni, ið kann pilka einstakar myndir burtur úr myndastreyminum og komprimera tað, sum eftir er. Neyðugt er eisini at gera ítøkiligar royndir av brúnni. Við verkætlanini verður dentur lagdur á tráðleysa tøkni, frammum káplar, ið javnan skulu skiftast.

## LEIÐSLUFRÁGREIÐING

Leisturin verður tí at menna eina prototypu fyri síðani at menna eina ítøkiliga søluvøru.

***Úrslit***

Fyrsta stigið var at kanna fyrimunir og vansar við ávikavist tráðleysum og kaðalsambandi. Niðurstøðan er, at tráðleysa sambandið gevur fleiri tøkniligar fyrimunir í mun til trolskipanina. Felagið hevur eisini fingið avtalu í lag við týskt felag, ið arbeiðir við gransking á økinum. Týska felagið skal tillaga tráðleysa sendaran í meðan JT electric veitir tøkniligu karmarnar við síni TrawlCamera loysn og sínum kundaskara. Ein minni roynd, at fáa skipanina at rigga, verður gjørd í Týsklandi í juni mánaði 2013 og ein størri roynd í føroyskum sjógvi aftan á summarið.

***Stuðulsskipanir, ið søkt varð ígjøgnum***

Søkt varð í gjøgnum stuðulsskipanina fyri menning av vørum og tænastum, hvørs endamál er at stuðla menning av nýggjum vørum og víðarimenning av verandi vørum. Gjøgnum stuðulsskipanina til KT-Verkætlanir, hvørs endamál er at stuðla menningini av nýggjum KT-skipanum, ella víðarimenning av verandi skipanum. Og í gjøgnum skipanina fyri nýskapandi verkætlanir, hvørs endamál er at stuðla uppbygging av framleiðslu av nýggjum vørum grundað á nýggja vitan, tá verkætlanin er serliga krevjandi viðvíkjandi kunnleika, váða og kostnaði v.m. og har leiðin til lønandi framleiðslu kann vera long.

***Umsøkjari***

Sp/f Faroe Water Sales

***Lýsing***

Faroe Water Sales hevur til endamáls at selja føroyskt vatn uttanfyri Føroyar, serliga í USA. Rúni Olsen og Oddur Friang Rasmussen standa fyri felagnum. Teir samstarva við amerikumannin Bill Harrison, ið eisini stendur sum verkætlanarleiðari. Bill Harrison hevur drúgvar royndir á økinum og hevur eitt nú virkað sum ráðgevi fyri danskar og týskar fyritøkur við ætlanum um at koma á amerikanska marknaðin.

***Stuðul***

Vinnuframi játtaði at stuðla verkætlanini í november 2012.

## *Endamál*

Endamálið við verkætlanini er at skapa umrøðu um Faroe Water í USA og at koma inn á amerikanska marknaðin. Hetta verður gjørt við at røkka so nógvum handlum í USA sum møguligt. Men fyri at selja til størru handilsketurnar í USA, er neyðugt at fara í gjøgnum ein sonevndan brokara, ið virkar sum bindilið millum fyritøkur og handlarnar. Men fyri at finna røttu umboðini skjótast møguligt, er endamálið at fáa eitt samstarv við branding felagið Cascadia LTD. Hetta felagið hevur ein breiðan hóp av brokarum, ið hava atgongd til meira enn 50.000 handlar.

Eitt annað endamál verður at luttaka á distributor shows og tradeshows fyri at røkka sjálvum handlunum. Málið er, at ein røð av handlum fara at taka vøruna til sín og royna hennara søluvirði. Fíggingin verður sostatt brúkt til tilfar at hava við á sølumessurnar, umframt til konsulenttænastur frá Cascadia og Bill Harrison.

## *Úrslit*

Avtala er undirskrivað við brandingfelagið Cascadia, og saman við teimum hevur Faroe Water Sales vitja fleiri messur og handlar í USA, ið hava sýnt Faroe Water stóran áhuga. Harumframt er ein røð av sonevndum samples sendar út til áhugaðar aktørar á amerikanska marknaðinum við góðum úrslitum.

Sum heild er áhugin stórur fyri vøruni, og gevur hetta góðar vónir um, at verkætlanin fer at bera ávøkst. Størsta avbjóðingin higartil hevur verið, at vitanin um Føroyar er avmarkað, tí hevur tað stóran týdning at arbeiða ígjøgnum nakrar viðurkendar samstarvspartar, soleiðis sum nú verður gjørt.

## *Stuðulsskipanir, ið søkt varð ígjøgnum*

Søkt varð í gjøgnum stuðulsskipanina fyri sølufremjandi tiltøk, hvørs endamál er at stuðla tiltøkum uttanlands, sum kunnu fremja føroyskan útflutning. Hesin studningur verður veittur til serlig marknaðarátøk, tá endamálið er at koma inn á nýggjar marknaðir ella at marknaðarføra nýggjar vørur. Talan kann vera um skipað átak í ávísum landi í eitt ávíst tíðarskeið.

## LEIÐSLUFRÁGREIÐING

### Hagtøl

Játtaði stuðulin hjá grunninum hevur háttað seg soleiðis seinastu seks árini (í túsund krónum):




| | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | Í alt |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Vinnuframaátøk | 1.850 | 2.700 | 1.800 | 667 | 258 | 25 | 7.042 |
| Menning | 2.635 | 1.953 | 1.341 | 719 | 885 | 704 | 8.237 |
| Marknaðarføring | 2.262 | 1.501 | 2.563 | 2.057 | 1.109 | 1.522 | 11.015 |
| Aðrar | 32 | 504 | 215 | 337 | 434 | 235 | 1.552 |
| | **6.779** | **6.660** | **5.919** | **3.780** | **2.686** | **2.486** | **27.845** |

## LEIÐSLUFRÁGREIÐING

Samlað fyri árini 2007-2012 hevur býtið verið soleiðis millum ymisku sløgini av stuðli:

